## Oddagrein

Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo



# KUNDU BYRJAÐ VIÐ SÆR SJÁLVUM

At tað eru tey veiku, sum skulu fylla fjarandi landskassan, hava teir tríggir samgonguflokkarnir - Sambandsflokkurin, Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin fleiri ferðir skorið út í papp. Tað síðsta dømið um hetta er, at nú skal fólkapensjónin fastfrystast, soleiðis at ein fólkapensjónistur missir upp í góðar 4.000 krónur næstu tvey árini. Eitt annað feskt dømið eru tímarnir, sum verða spardir burtur í fólkaskúlanum - har børn við serligum tørvi verða meinast rakt, og eitt triðja dømið er um røktarheimsplássini, sum nú verða spard burtur.

Tað var ikki gamal javnaðarpolitikkur at pilka við vælferðartænastur. Hesum hevur Javnaðarflokkurin brent seg av fyrr. Tað var annars við løgtingsvalið í 1958, at Javnaðarflokkurin vann stórsigur og gjørdist størsti og stjórnarberandi flokkurin heilt fram til kreppuárini í nítiárunum, tá flokkurin misti hesa støðu. Og tað var júst tí, at flokkurin egndi við fólkapensjónini, og gjøgnumførdi hesa skipan árið eftir, at flokkurin vann hetta álit millum veljararnar.

Men hetta er nú eftir øllum at døma broytt. Flokkurin leggur ikki longur tann týdning í fólkapensjónina og aðrar almannaveitingar, og tí verður javnan skarvað burtur av pensjónini. Tað síðsta stuntið í so máta er tað, sum Sosialurin borðreiddi við fríggjadagin, at automatiska javningin av fólkapensjónini, sum fyrr var fýra prosent, síðani trý, nú heilt verður skorin burtur - fyri at spara landskassanum 12 milliónir krónur. Gott nokk sigur landsstýrið, at talan er bara um eina fyribilsskipan í tvey ár, men tað stendur ikki í lógartekstinum. Men tað hevur landsstýrið gjørt við eykaskattin á háinntøkur, her hevur landsstýrið tryggjað sær, at talan er um eina fyribils skipan, sum verður tikin avaftur.

Slík tiltøk virka bara so hálvhjartað - og púra uttan politiskt handalag, fyri ikki at siga, at fólk, sum finna upp á slíkt, als ikki



hava politiskt tev heldur. Hetta er beinleiðis politiskt sjálvmorð hjá Javnaðarflokkurin at verða partur av slíkum.

**Slík fólk hava lítið politiskt tev**

Í øðrum londum hoyra vit um politikarar, sum byrja við sær sjálvum, tá óbehagiligar sparingar skulu gerast. Enska stjórnin hevur lækkað lønir hjá ráðharrum og parlamentslimum, og eisini í Danmark hevur verið kjak um at lækka lønir hjá fólktingslimum og ráðharrum. Men hetta kjakið er ikki Føroyum. Um nøkur respekt skuldi verið kring slík sparitiltøk, so áttu politikararnir at byrja við sær sjálvum og lækkað sínar egnu lønir.

---

## Heiðursrmerkir og persónlig met

Tríggir føroyskir svimjararar hava tikið lut í altjóða svimjikappingini fyri brekað, German Open,

Tríggir føroyskir svimjarar hava um luttikið á German open á langbana um vikuskiftið. Kappingin, ið var í Berlin, er fyri fólk við breki. Teir føroysku svimjararnir eru 11 ára gamla Krista Mørkøre úr Ægi, Ragnvald Jensen úr svimjifelagnum FLOT og 12 ára gamli Dann Akursmørk, ið venur og býr í Danmark.

Talan var um eina kapping á høgum støðið við gott 600 svimjarum úr øllum heiminum luttóku. Føroysku svimjararnir stóðu seg væl og settu fleiri persónlig met. Dann Akursmørk tók heili 12 sekund av síni tíð í 200 m blandað, hann fekk tíðina 3.32,70. Hetta rakk til eitt fjórða pláss í bólkinum.

Krista Mørkøre hevur eisini betrað um allar sínar tíðir frá seinast hon luttók í kappingini. Hon vann eitt bronsuheiðursmerki í 200 m frí við tíðini 3.06,62.

Ragnvald Jensen vann ikki færri enn trý gullheiðursmerki í kappingunum 50, 100 og 200 m bringu og tvey silvurheiðursmerki í 50 m rygg og 50 m frí.

Føroysku svimjararnir koma heim aftur mánadagin.





**Jørgen sum redaktørur**

SJÚRÐUR SKAALE KJAK Á SÍÐU 12



**Ein miljard í makreli**

TIÐINDI Á SÍÐU 10



## Peter Lundin skal verða pápi

Enn ein kvinna er endað í klørnum á hópdrápsmanninum Peter Lundin. Hesaferð er tað ein 25 ára gomul kvinna úr Aalborg, sum ynskir at fáa barn við drápsmanninum.

Sambært Ekstra Bladnum hevur tann 25 ára gamla kvinnan leingi verið saman við Peter Lundin, sum hevur broytt navn til Bjarne Skounborg.

Ekstra Blaðið sigur seg hava verið í samband við fleiri keldur, sum greiða frá, at tann 25 ára gamla kvinnan ynskir at fáa barn við tí heldur óvanliga makanum.

Tá tann 25 ára gamla kvinnan er í Keypmannahavn, so svevur hon mangan hjá pápanum hjá Peter Lundin í eini íbúð í Lyngby.

Peter Lundin var í 11 dagar giftur við føroysku Mariann Poulsen, og tað tók henni bert 11 dagar at broyta hugsan um hennara giftarmál.

*barbara@sosialurin.fo*

Sosialurin Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*